## Grønland

Grønland er so mikið stórt, at hini 24 oyggjasamfeløgini, ið taka lut á oyggjaleikunum høvdu øll passað inn í grønlendska innlandsísin. Grønland er heilar 2.166.000 ferkilometrar til støddar, men tað búgva bert 56.000 fólk í Grønlandi. ÌSF gjørdi eitt stórt arbeiðið fyri, at Grønland kundi gerast partur av oyggjaleikunum, tí summi umboð fyri aðrar oyggjar hildu, at Grønland var ov stórt í stødd til at kunna roknast sum oyggj, og taka lut á oyggjaleikunum. Grønland hevur júst fingið eina nýggja sjálvstýrislóg, bert 30 ár aftaná teir fingu heimastýrislógina. Grønland er eins og Føroyar nógv tengt at tí, sum sjógvurin gevur.



## Guernsey

Ermasundsoyggin, Guernsey er bert 78 ferkilometrar til støddar, men har búgva heili 65.500 fólk. Veðurlagið er rættiliga gott á Guernsey. Talan er um mildar vetrar og sólríkt á sumri. Heitastu mánaðarnir á Guernsey eru august og september, har miðalhitalagið liggur um tey 20 hitastigini. Kaldasti mánaðin er februar, har hitastigini liggja um tey seks stigini í snitt. Nógv fíggjarvirksemi er á Guernsey. Bruttotjóðarúrtøkan fyri hvønn guernseybúgva liggja um teir 40.000 amerikonsku dollarnar, so Guernsey er avgjørt millum tey ríkastu samfeløgini í heiminum.



# Golf skal á breddan

**- Vit vóna, at vit kunnu fáa eitt gott úrslit, soleiðis, at føroysku miðlarnar kunnu vísa ítróttinum ans, sigur Oskar Eiriksson, sum er við í føroyska landsliðshópinum í golf**




Uni Holm Johannesen



Oskar Eiriksson

Í drúgv áramál stuðlaði hann føroyskum fótbóltsleikararum frá síðulinjuni. Hann var eyðkendur í HB-húsinum við trummuni, og serliga til fótbóltslandsdystir, har hann var ein av oddamonnunum í 12. manni. Í komandi viku verður hann eisini við í føroyska ferðalagnum, sum fer til Oyggjaleikirnar á Álandi. Men hann hevur hvørki trummuna ella andlitsmálingina við í viðførinum. Hinvegin er golfstavurin við.

Oskar Eiriksson fer í komandi viku at umboða Føroyar í golf á Oyggjaleikunum. Tað er fyrst og fremst í eini roynd at økja um áhugan fyri ítróttini millum føroyingar, at seks leikarar í komandi viku taka dystin upp við aðrar oyggjarbúgvar.

### Vekja áhuga fyri golf

Fyri góðum seks árum síðan varð skipað fyri einum degi á Glyvursnesi á Argjum, har øll áhugaði kundu fáa undirvísing í golf. Oskar Eiriksson tók lut í tiltakinum, og hann varð beinanvegin bitin av at sláa lítla og hvíta bóltin frá holi til hol. Hann keypti sær skjótt eitt venjingarsett, og hann hevur vant miðvíst síðan. Áhugin fyri ítróttini er tó fleiri ára gamalur, tí hann sum smádrongur nýtti nógva tíð upp á minigolf.

Men hóast hann seinastu seks árini hevur spælt golf dagliga, tekur hann lut á Oyggjaleikum fyri at læra.

– Tað gera vit allir, tí hetta er bara triðju ferð, at føroyskir golfspælarar eru við. Vit vóna, at vit kunnu fáa eitt gott úrslit, soleiðis, at føroysku miðlarnar kunnu vísa ítróttinum ans. Tað er okkara vón, at fleiri føroyingar fara at spæla golf. Málsetningurin er at lyfta okkum av aftasta plássinum, sum hevur verið úrtøkan hjá okkum higartil, men tað verður sera torført. Vit fara í øllum førum at stríðast fyri tí, sigur Oskar Eiriksson.

Føroyska manningin, sum skal umboða Føroyar í golf á Oyggjaleikunum, hevur ongantíð verið størri enn hesaferð. Talan er um fimm fólk, og fyri fyrstu ferð er eitt konufólk við. Umframt Oskar Eiriksson eru Rói Christiansen, Jónfinn Thomassen, Janus Norðberg og Finngerð Sólbjørg úttikin.

### Væl fyrireikaðir

Tað hevur ikki verið møguligt hjá føroyska landsliðshópinum at vant saman seinastu tíðina. Rói Christiansen og Jónfinn Thomassen eru báðir búsitandi í Danmark, og Finngerð Sólbjørg hevur fyribils sett sær búgv í London. Men heima í Føroyum hava Oskar Eiriksson og Janus Norðberg fyrireika seg á besta hátt.

– Vit hava runnið á maskinunum í Yndi, og á páskum vóru vit í Danmark og spældu saman. Áðrenn leikirnir verða settir, fara vit eisini at spæla á vøllunum á Álandi, so vit eru væl fyrireikaðir, sigur Oskar Eiriksson.

Men hvør føroyingur fer serliga at standa seg væl, væntar tú?

– Eg má fyrst og fremst nevna Róa Christiansen. Hann hevur staðið seg sera væl, og vónandi fer hann at gera seg galdandi. Vit hava kunnað okkum væl um mótstøðuna, og tað vísir seg, at fleiri eru á veg at gerast yrkisleikarar, so tað verður ikki lætt, staðfestir Oskar Eiriksson.



### GOLF

Golf er ein av minni og nýggjaru ítróttargreinunum í Føroyum, og enn hava golfspælararnir ikki gjørt vart við seg í kappingunum á Oyggjaleikunum. Hesaferð fara 5 golfspælarar avstað til Oyggjaleikir, og teir ælta at gera vart við seg. Men roknast kann ikki við, at golfspælararnir fara at blanda seg upp í heiðursmerkjastríðið.

### FAKTA

**Hesi umboða Føroyar í golfspæli**
Oskar Eiriksson
Rói Christiansen
Jónfinn Thomassen
Janus Norðberg
Finngerð Sólbjørg